

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 03 - 2013

# Sami vøkstur í eftirspurninginum eftir olju

OPEC-londini halda fast um, at eftirspurningurin eftir olju verður umleið 840.000 tunnur størri um dagin í ár enn í fjør. Tað stendur í februar-frágreiðingini, sum varð almannakunngjørd í dag. Sostatt væntar OPEC, at eftirspurningurin verður 89,67 milliónir tunnur um dagin í 2013, og tað er at kalla tað sama, sum felagsskapurin metti seinast. Um heimsbúskapin sigur OPEC, at hann fer ætlandi at veksa 3,2 prosent í ár, sum er 0,2 prosentstig meiri enn í 2012. OPEC sigur, at lond uttan fyri felagsskapin fara at økja sína framleiðslu umleið 0,96 milliónir tunnur um dagin í ár samanborið við útboðið hjá hesum londunum í fjør. Hendan metingin er eitt vet hægri, enn OPEC fyrr hevur mett. At enda væntar felagsskapurin, at eftirspurningurin eftir OPEC-olju fer framhaldandi at liggja um 30,1 milliónir tunnur um dagin.